# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

*Lesið alt um hondbóltsdystirnar í ÍtróttarSosialinum týsdagin*

# Grannauppgerðir á skránni

*Størsti spenningurin hetta vikuskiftið verður helst um, hvussu leikur fer, tá bestu mans- og kvinnuliðini hjá Neistianum og Kyndli bresta saman*



*StÍf má vera bæði Alexandur Johansen (á myndini) og leikandi venjaran, Jónleif Sólsker fyri uttan, tá teir sunnudagin taka móti H71*

***Savnsmynd***

JÁKUP MØRK

Endaspælið í hondbólti fer av álvara í gongd hetta vikuskifti, og nú verður tað, at stigini av álvara fara at telja. Meðan ein sigur í grundspælinum í roynd og veru bert gav hálva úrtøku, so gongur teljiskipanin nú við fullari ferð komandi 3 mánaðirnar.

**Kyndil skal vinna**

Hjá kvinnunum verður sett hol á endaspælið leygardagin, tá VB skal eitt legg norður til Vestmanna.

Sum er, liggur VÍF á triðja plássi, meðan VB er á fimta sessinum, og hetta er helst ein søga, sum í hvussu so er VB ikki ætlar at lata sær lynda.

Seinastu dystirnar gekk eisini framá hjá suðuroyargentunum, og tískil er helst væntandi, at tær fara at geva VÍF størri mótstøðu enn í grundspælinum, tá tær taptu við 5 málum, uttan at tær nakrantíð høvdu verið í nær námind av sigrinum.

Sunnudagin verður grannauppgerð í Havn, tá Neistin og Kyndil skulu dystast um rættin til at kalla seg besta liðið í høvuðsstaðnum.

Higartil hevur tað gingist Kyndil betri í landskappingini, men eftir at Neistin fekk eina rættuliga laka byrjan, fingu tær skava nógv stig til sín seinna helming av grundspælinum, m.a. við at vinna seinna dystin móti júst Kyndli.

Umframt at vera grannauppgerð, hevur dysturin eisini rættuliga stóran týdning fyri støðurnar hjá liðunum báðum. Sum er, eru bert tvey stig á muni millum liðini, og kann Neistin við einum sigri rættuliga blanda seg uppí stríðið um heiðurskrónurnar. Hinevegin er Kyndil liðið, sum av mongum verður mett sum einasta hóttan móti Stjørnuni, og skulu tær gera álvara av hesum, eru tær helst noyddar at vinna dystin sunnudagin.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum hetta vikuskifti verður í Runavík, har botnliði, Tjaldur, skal hýsa heitasta boðnum upp á FM-vinnara, Stjørnuni. Talan verður her helst um ein avgreiðsluspurning fyri klaksvíksgenturnar, havandi munin millum liðini bæði í huga, og ikki minst tað spælið, sum tey hava sýnt higartil í kappingini.

**Skert StÍF lið**

Í bestu mansdeildini verða tríggir dystir leiktir sunnudagin. Í høllini á Hálsi skulu menninir, eins og kvinnurnar, spæla lokaluppgerð, tá bláa høvuðsstaðarliðið tekur ímóti grønu grannunum.

Kyndil er í ár í teirri óvandu støðu, at teir eru undir Neistanum á stigatalvuni, nú helvtin av landskappingini er farin aftur um. Munurin millum liðini bæði er einans tvey stig, og henda munin hevur Neistin vunnið sær júst í grannadystunum báðum, sum vórðu leiktir í grundspælinum.

Hesir báðir dystir hava tó verið sera javnir, so uttan iva kann tað gerast spennandi, tá liðini bæði enn eina ferð skulu stríðast móti hvørjum øðrum.

Inni í Runavíkini verður botnuppgerð, tá Tjaldur tekur móti KÍF, og gongst eftir vild hjá Tjaldrinum, kunnu teir sleppa sær enn longur frá niðasta plássinum. Kollfirðingar hava tó ongar ætlanir um at geva skarvin yvir, og uttan iva fara teir at stríðast fyri at fáa okkurt heim við sær aftur.

Seinasti dysturin sunnudagin verður leiktur á Skála, har føroyameistararnir úr StÍF skulu leika móti H71. Á pappírinum kann hetta helst tykjast at vera ein lættur dystur fyri strandingarnar, men fyritreytirnar undan dystinum eru ikki av teimum bestu.

Tað er nevnliga soleiðis, at bæði leikandi venjarin, Jónleif Sólsker, og ársins stjørnuskot seinasta kappingarár, Alexandur Johansen, helst verða noyddir at hyggja eftir liðfeløgunum, ístaðin fyri sjálvir at taka lut í spælinu. Jónleif hevur í vikuni havt trupulleikarar í høgra knæ, uttan at tað kann staðfestast, hvat bilar, og Alexandur hevur aftur fingið trupulleikar við knænum, sum varð skurðviðgjørt tíðliga í heyst.

# Grand-Prix kapping í borðtennis

*Leygardagin 15. januar verður onnur Grand-Prix kappingin í borðtennis hildin í badmintonhøllini í Havn*

JÁKUP MØRK

Fyrsta kappingin í vetur varð somuleiðis hildin í badmintonhøllini, meðan triðja og seinast kappingin av hesum slag verður hildin í ítróttarhøllini í Trongisvági um nakrar vikur.

**Alt avgreitt leygardagin**

Paula Eikhólm, næstformaður í kappingarnevndini á Borðtennissambandinum sigur, at allar kappingarnar verða avgreiddar leygardagin, og tískil verður talan um ein hampuliga langan dag fyri íðkararnar.

Byrjað verður kl. hálvgum tíggju, tá piltar og pinkur fara at leika. Kl. 11.30 leika smágentur og dreingir. Kl. 14.00 fara dreingirnir í gongd og 15.00 standa genturnar fyri tørni.

Seinastu kappingarnar byrja kl. 16.30 og eru hetta kappingarnar hjá unglingum, kvinnum og monnum.

Paula væntar, at kappingarnar verða lidnar á kvøldi, nakað eftir kl. 19.00.

**Øll kunnu luttaka**

Borðtennissambandið greiður eisini frá í tíðindaskrivi, at tey, sum ætla sær at vera við í Grand-Prix kappingini skulu boða frá luttøku í seinasta lagi mikudagin 12. januar á tlf. 422211.

Sagt verður víðari, at luttøkugjaldið fyri hvønn leikaran er 20 kr., og eigur hetta at vera goldið, áðrenn kappingin byrjar.

Grand-Prix kappinginer annars skipað soleiðis, at allir luttakararnir fáa eitt ávíst stigatal, alt eftir, hvussu teir standa seg í kappingini, og tá allar kappingarnar so eru leiktar, verður ársins Grand-Prix vinnari kosin.

At enda verður sagt frá, at øll eru vælkomin at luttaka, og at eingin treyt er um, at luttakarar skulu vera aktivir í nøkrum felag.




*Onnur Grand-Prix kappingin í vetur verður í Badmintonhøllini í Havn komandi vikuskifti*



Viðmerking:

# Barnaansing í Klaksvíkar kommunu ár 2000

Teir borgarar í Klaksvíkar kommunu, ið hava børn á bíðilista til barnaansingar, fóru úr gomlu øldini við lyfti frá formanninum í sosialu nevnd, Jógvan Lützen, um enn fleiri barna-ansingarpláss í ár 2000.

Hetta vóru vit eisini fleiri onnur ið fegnaðust um.

Í Norðlýsinum fyrst í desember 1999, stendur grein við yvirskriftini »Enn fleiri barnaansingarpláss« av Jógvan Lützen. Hann nevnir í greinini, at frá 1. januar 2000 verður barnaansingin løgt út til kommunurnar at umsita. Fyri Klaksvíkina vil hetta merkja, at tá ið peningur er nýtt at umsita økið, so verður eitt avlop á umleið 1,3 milliónir at nýta til nýggj barnaansingartilboð. Víðari metir Jógvan Lützen, at hetta vil geva frá 25 til 60 nýggj ansingarpláss, alt eftir hvør loysn ið verður vald. Men hann nevnir onki um, at hevði samgongan tikið undir við okkum, so høvdu vit haft tað dupulta krónutalið at rátt yvir til nýggja barnaansing í ár 2000.

Andstøðan í býráðnum legði nevniliga fram uppskot í sínari fíggjarætlan fyri kommunua, fyri ár 2000, at vit skuldi seta 1,4 millión av til nýggja barnaansing aftrat teimum 1,3 milliónunum, ið fóru at leypa av, tá ið vit fingu hetta økið at umsita.

Hetta gjørdu vit av fleiri orsøkum:

- Fyrst og fremst tí vit høvdu sett okkum fyri at minka bíðilistan munandi, so barnaansing ikki skal vera ein forðing fyir at flyta til Klaksvíkar, tað er veruleikin í dag.
- So øll tey, ið hava trupulleikar við at sleppa til arbeiðis í dag í Klaksvík vegna vantandi barnaansing, kunnu fara ekkaleyst til arbeiðis, hetta er ikki møguligt í dag.
- Vit ivaðust í um ansingin fór at vera løgd út til kommununar at umsita, tíverri fingu vit rætt í fyrsta umfari.



- Og síðst men ikki minst, tí at vit eiga sum kommuna at vísa at vit taka henda spurning í ramasta álvara og vilja leggja orku í at loysa hann, tað vísa vit ikki við einum stórum nulli til nýggja ansing.

Okkara uppskot var sum øllum kunnugt felt og Landsstýrið hevur útsett at leggja økið út til kommunurnar til 1. apríl 1999. Hugsar man um onnur mál, ið sami landsstýrismaður umsitur, so kann ein eisini ivast í um hetta verður veruleiki fyrsta apríl.

Úrslitið er, at í dag stendur Klaksvíkar kommuna við ongari krónu til nýggja ansing. Um barnaansingar økið verður lagt ú ttil okkum, so skal kommunan fara at fyrireika loysnir. Tey ið kenna arbeiðsgongdina í tílíkum málum vita, at eitt tílíkt fyrireikingararbeiði ofta tekur drúgva tíð. So eg vænti ikki at foreldur búsitandi í Klaksvík og tey ið hava ætlanir um at flyta til býin kunnu vænta sær nakað innan nýggja barnaansing í hesum hálvárinum.

Men valár er í ár so kanska vend kemur í…

**Eyðgunn Samuelsen**
**býráðslimur**

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo



**Fyrsti millumflokkur í Havn, august 1945:**

Standandi frá vinstru: Gentan við pappírinum er Annelise Kaaber og gentan við einari hond á øksluni er Birna Helmsdal, andlitið omanfyri er Hervør Joensen, síðan Símun Simonsen á Høgabóli, Bjørn Isholm og omanfyri hann Kjartan Justinussen.

Sitandi frá vinstru: Anders Hansen - við hondunum fyri andlitið, Poul Sloan, Herluf Joensen, Fróði Mouritsen, Harry Lava og Lítli (Andreas Johansen).

Av dreingjunum á myndini er bert Andreas Reinert á lívi.

Annars er at siga, at flestu dreingirnir eru í gummiskóm. Yvaleyst úr rekagummi - kanska gjørdir í Hesti? Hetta er jú beint eftir kríggið og undir krígnum, og beint aftaná var annað tilfar ikki at fáa, brúkti tú ikki húðaskógvar. Fróði er eisini í rotuskóm, hvítir tveingir er mannfólkalitur. Plousfour var eisini tá buksumóti.

# Tveir Havnardreingir

*Poul Sloan og Herluf Joensen til minnis*

Í september hittust vit hjá Didduni í J.Dahlsgøtu (Margreta Balle); tað plagar so at vera, tá onkur teirra, sum búgva uttanlands, eru heima, at vit hittast til eitt prát. Í hesum føri eru „vit" næmingarnir, sum fóru í Realskúla, í 1. Millum, tá heimsbardagin var av í 1945. Vit vóru tá 32 í tali - børn á 11-12 ára aldri. At „sleppa í Realskúlan" var, um tú „kláraði upptakilsisprøvan".

Kvøldið heima hjá Margretu kom í lag, tí Birna (Helmsdal), sum býr í Onglandi, var heima. Vit gjørdu tá av at boða øllum til stevnu komandi 21.juni. Í fyrsta umfari at fáa boðini út, og tað varð gjørt 15. november. Í summar eru 50 ár síðan vit søgdu Realskúlanum farvæl og 25 ár síðan vit høvdu „klassastevnu".

Millum tey 32 vóru Poul Sloan og Herluf Joensen. Og nú, góðan mánað seinni, nú vit skriva ár 2000, eru teir báðir farnir av verðini.

Poul andaðist í heiminum í Strandby, Jútlandi 21. desember 1999. Hann fór til gravar úr Ebenezer 27. desember. Herluf andaðist í heiminum í Oslo 2.jóladag og varð jarðaður i Østre Gravlund í Oslo nú 7.januar.

Í fjør summar var Poul heima til ættararhaldið hjá Geilafólkunum í Havn.Ta ferðina hittust nøkur okkara á Kráarvegi, heima hjá Katrini (Samuelsen). Eitt hugnaligt kvøld, har Poul, sum altíð fróður og fregin, segði frá mongum; hóast sjónin var næstan eingin, gav hann ongantíð til kennar trupulleikar sínar. Poul hevði vónað at koma heimaftur til „klassastevnuna" í summar.

Poul er føddur 6.januar 1934, foreldur hansara vóru Ella og Andrew Sloan, trúðboðari, tey búðu í Ingutrøð, í Lucas Debesargøtu 14. 4 vóru systkinini, og nú eru báðir brøðurnir William og Poul farnir. Poul var útbúgvin skipsførari.

Baldist alt sítt lív á sjónum, førdi fiskiskip og var eisini á annan hátt uppi í fiskivinnuni, til heilsan fór at bila. Har Poul var, var hann heilur, ikki hann spardi seg. Katrin og Poul fluttu til Jútlands og búsettust í Strandby.

Herluf er føddur 21. juni 1934. Foreldur hansara eru Jona og Einar Joensen, prentsmiðjumeistari, sáli úr Lítlu Tvørgøta 5, 5 vóru systkini. Elstu synirnir Anfinn og Herluf eru nú báðir farnir. Herluf hevði ætlanir um at koma heim í summar, mamman fyllir 90 15. juni.

Herluf gavst í skúlanum og fór til sjós, í 1949 var hann við Vágssluppini „Elini" í Íslandi og tað fortelist, at hann fekk ein harðan dóp, tí teir komu í rættuligt illveður, í 1950 róði hann út í Grønlandi og síðani fer hann við Norðmonnum. Hann hevði síðani ongantíð aftur fastan bústað í Føroyum. Styttri skifti í sekstiárunum var familjan heima. 3 eru døturnar í hjúnalagnum, Cindy, Aina og Ivy. Herluf var útbúgvin hovmeistari í Noregi. Hvønn sunnumorgun ringdi Herluf til mammuna. Gløggur var hann og dugdi væl at siga frá, var hópin vitandi.

Um tey 32, sum fóru í realskúla í 1945, og fingu heft á seg heitið „hin sorgleysi skarin", øll nú um pensjónsaldur, summi rokkin onnur um snarið, er at nevna, at 10 teirra, triðingurin, búsettist uttanlands.

At so eisini triðingurin, alt dreingir, er farin í Harrans hendur er so lívsins gongd.

Vit minnast Poul Sloan úr Lucas Debesargøtu og Herluf Joensen úr Lítlu Tvørgøtu við stórari virðing og vilja fegin siga tykkum avvarandi okkara samkenslu.

Kvirran eftir teir sannar, at stutt er skeiðið vit virka.

**Jákup Lindenskov**